FÍGGJARMÁLARÁÐIÐ
Ministry of Finance

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3
Postboks 208
110 Tórshavn

Tórshavn, tann: 4. januar 2024
J. nr.: 23/25263-2
Viðgjørt: DH

Svar til §52a fyrispurning nr. 52-062/2023 frá Liljan Weihe, løgtingskvinnu, settur landsstýriskvinnuni í fíggjarmálum, Ruth Vang, um skattalætta og lønarlyft hjá lágløntum.

Fyrispurningurin er soljóðandi:

1. Hvør var inntøkan hjá hesum bólkum í fulltíðarstarvi og á hægsta lønarstigi 1. august 2023 og hvussu nógv høvdu tey eftir aftaná skatt og føst gjøld:
   - Ófaklært krambafólk, lønt eftir sáttmála ml. Samverk (S&K) og Føroya Arbeiðsgevarafelag í lønarbólki 2
   - Arbeiðari, sum fær fasta mánaðarløn eftir sáttmála ml. Føroya Arbeiðarafelag og Føroya Arbeiðsgevarafelag
   - Heilsuhjálpari løntur eftir sáttmála ml. Heilsuhjálparafelagið og KAF
   - Heilsurøktari løntur eftir sáttmála ml. Heilsurøktarafelagið og FMR
2. Hvør verður inntøkan hjá omanfyri nevndu bólkum í fulltíðarstarvi og á hægsta lønarstigi 1. januar 2024, og hvussu nógv hava tey eftir aftaná skatt?
3. Hvør verður inntøkan hjá omanfyri nevndu bólkum í fulltíðarstarvi og á hægsta lønarstigi 1. januar 2025, og hvussu nógv hava tey eftir aftaná skatt?

Svar:
Spurt verður um inntøkur og skatt fyri fýra starvsbólkar yvir árini 2023, 2024 og 2025. Ávis fyrivarni og viðmerkingar eru til tølini, tí ymisk viðurskifti eru ókend og aftur okkurt skal takast við í tulkingini av tølunum.

Ítøkiliga verður spurt til lønirnar 1. august 2023, 1. januar 2024 og 1. januar 2025. Í sáttmálunum hjá Føroya Arbeiðsgevarafelag við Samverk og Føroya Arbeiðarafelag hækka lønirnar 1. mai 2023. Fyri sáttmálarnar á almenna arbeiðsmarknaðinum hækka lønirnar 1. oktober 2023 og aftur 1. januar 24, tá hesir bólkar fáa lønarlyft. Tann 1. august 2023 er ávikavist beint eftir og beint fyri lønarhækkingar, og tískil skulu samanberingar millum sáttmálarnar gerast við fyrivarni. Eingin av pørtunum hava gjørt sáttmála fyri 2025, og tí ber ikki til at svara, hvør lønin er 1. januar 2025.

Talva 1:
Mánaðarløn

	August 23	Januar 24	Januar 25
Samverk	25.368	25.368	eingin semja
FA	27.142	27.142	eingin semja
Heilsuhjálpari	27.925	30.500	eingin semja
Heilsurøktari	30.854	33.492	eingin semja

Talva 1 vísir mánaðarlønir á endastigi uttan viðbøtur, yvirtíð ella frítíðarískoyti fyri hesar bólkar:

- Ófaklært krambafólk, lønt eftir sáttmála ml. Samverk (S&K) og Føroya Arbeiðsgevarafelag í lønarbólki 2
- Arbeiðari, sum fær fasta mánaðarløn eftir sáttmála ml. Føroya Arbeiðarafelag og Føroya Arbeiðsgevarafelag
- Heilsuhjálpari, sum er løntur eftir sáttmála ml. Heilsuhjálparafelagið og KAF
- Heilsurøktari, sum er løntur eftir sáttmála ml. Heilsurøktarafelagið og FMR

Harafturat skal fyrivarni takast fyri, at sáttmálar á almenna arbeiðsmarknaðinum eru normlønir, meðan tað á privata arbeiðsmarknaðinum eru minstulønir. Tað merkir, at lønirnar á privata arbeiðsmarknaðinum kunnu liggja omanfyri tað, sum stendur í sáttmálanum.

Skattur verður roknaður árliga, og tískil mugu mánaðarinntøkurnar roknast um til ársinntøkur. Av tí at eingin semja er gjørd fyri alt árið 2024 og 2025, so ber bert til at rokna inntøku fyri og eftir skatt fyri árið 2023.

Talva 2:
Inntøka íroknað 1,5% frítíðarískoyti

	Um árið	Um mánaðin	Eftir um mánaðin
Samverk	305.214	25.434	16.043
FA	325.541	27.128	16.982
Heilsuhjálpari	343.556	28.630	17.757
Heilsurøktari	379.602	31.634	19.273

Talva 2 vísir inntøkur fyri og eftir skatt og onnur gjøld. Í døminum verður goldin landsskattur, kommunuskattur á 19%, øll sosialgjøld umframt kringvarpsgjald. Í døminum verður eingin kirkjuskattur goldin.

Samverk og FA hava sáttmálar til 1. mai 2024, meðan heilsuhjálparar og heilsurøktarar hava sáttmálar, sum ganga fram til 1. oktober 2024. Partar av almenna arbeiðsmarknaðinum hava tó fyri stuttari tíð síðani gjørt sáttmálar, har lønirnar hækka 4,75% 1. oktober 2024, og sum eru galdandi eitt ár fram.

Fyri at geva ein mynd av hvussu lønarhækkingar og skattabroytingar kunnu hugsast at ávirka í 2024 og 2025, eru tvey dømi í talvu 3 við inntøkum á 25.000 kr. og 30.000 kr. um mánaðin í 2023, og sum vaksa 4% um árið í 2024 og 2025.

Talva 4 vísir, hvussu nógv hesi fáa útgoldið um mánaðin árini 2023-2025. Í útrokningunum er hædd tikin fyri skattalættanum í 2024 og 2025, umframt at ALS-gjaldið lækkar úr 1% til 0,8% í

2024. Somuleiðis er hædd tikin fyri, at kringvarpsgjaldið eftir ætlan hækkar miðskeiðis 2024 og verður javnað 2% í 2025.

Talva 3:
Hugsað ársinntøka

	2023	**2024**	**2025**
Dømi 1	300.000	312.000	324.480
Dømi 2	360.000	374.400	389.376

Talva 4:
Útgoldið um mánaðin eftir skatt og gjøld

	2023	**2024**	**2025**
Dømi 1	15.802	16.684	17.876
Dømi 2	18.449	19.577	20.908

Við væntaðum lønarvøkstri og skattalætta kann roknast við, at áðurnevndu bólkar fáa millum 2.000 kr. og 2.500 kr. meira útgoldið mánaðarliga í 2025 í mun til í 2023.

Heilsurøktarar og heilsuhjálparar fáa afturat vanliga lønarvøkstrinum og skattalættanum eitt lønarlyft, ið merkir um 800 kr. meira útgoldið um mánaðin.

Tinganes, 4. januar 2024

Ruth Vang
Landsstýriskvinna í fíggjarmálum